## Pinkubarn vakt til lívs

Ein nýfødd ísraelsk genta varð av læknunum søgd at vera deyðfødd, og tí løgd í kølirúmið í líkhúsinum. Men gentan var ikki deyð kortini. Mamman, 26-ára gamla Faiza Majdub trúði ikki sínum egnu eygum, tá hon seks tímar seinni vildi siga eitt seinasta farvæl við dóttrina, og fann hana á lívi. Hon varð í skundi flutt á intensivu deild á sjúkrahúsinum í Nahariya, har skelkaðir læknar máttu staðfesta, at gentan var á lívi. Hevði mamman ikki sett upp á at síggja dóttrina eina seinastu ferð, kundi gentan verði grivin livandi, skriva donsk bløð.

## Svøríki boykottar Russland

Sviar eru so illir um ta russisku framferðina í Georgia, at stjórnin í Stockholm fekk fullan stuðul frá øllum teimum politisku flokkunum, tá hon nú um dagarnar gjørdi av at slíta tað hernaðarliga samstarvið við Russland. Avgerðin ber millum annað í sær, at londini fara ikki at hava felags hernaðarvenjingar longur. Svenska tíðindastovan skrivar, at stjórnin tók avgerðina eftir at hava fingið eina frágreiðing frá Carl Bildt, uttanríkisráðharra, sum var í Georgia í síðstu viku.

# Pelagiska hjáveiðan undir lupp

**Eitt mál, sum var nógv frammi undir viðgerðini av fiskidøgum, var møgulig hjáveiða hjá pelagisku skipunum, sum fiska í føroyskum sjógvi**

HJÁVEIÐA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í tíðini hjá Bjørn Kalsø, fyrrverandi landsstýrismanni í fiskivinnumálum, varð eitt skifti nógv gjørt burtur úr møguligari hjáveiði hjá pelagisku skipunum, sum fiska í føroyskum sjógvi. Fjølmiðlarnir settu fokus á hetta mál, sum eisini fekk drúgva umrøðu á tingi. Við tíðini fjaraði málið burtur aftur, og síðan hevur stórt sæð verið tøgn.

Nú fiskidagarnir fyri komandi ár aftur skuldu ásetast sambært lógini um vinnuligan fiskiskap, tók spurningurin um hjáveiði seg uppaftur.

Málið um fiskidagar fór í vinnunevndina eftir fyrstu viðgerð á tingi, og tá álitini komu aftur úr nevndini, hevði eitt nú formaðurin, Jóhan Dahl, møguliga hjáveiði hjá pelagisku skipunum við í sínum minnilutatilmæli til løgtingið.

Í sínum áliti vísti Jóhan Dahl á, at neyðug stig eiga at verða tikin til at økja um eftirlitið hjá Fiskiveiðieftirlitinum, serliga við atliti til hjáveiði hjá uppisjóvarflotanum og fremmandum skipum í føroyskum sjógvi.

Formaðurin í vinnunevndini mælti eitt nú til, at skipanin við eftirlitsfólki umborð á pelagisku skipunum eigur at fáast at virka aftur.

- Eg havi ta fatan, at nógva svartkjaftaveiðan undir Føroyum hevur beinleiðis ávirkan á støðuna hjá fiskastovnunum, segði hann.

# Stór vatnútbygging í Sjóvar kommunu

**Í Sjóvar kommunu hava tey drukkið reint kelduvatn, men nú kommunan hevur fingið nýggja og stóra vatngoymslu, er talan um áarvatn. Samstundis hevur kommunan útvegað sær nútímans reinsiverk**

VATNÚTBYGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Eitt av teimum stóru arbeiðunum, sum Sjóvar kommuna hevur havt koyrandi í eina tíð, nærkast nú endanum. Tað er ein nýggj og stór vatngoymsla, ið kommunan hevur latið byggja Uppi undir Fossum, sum liggur í umleið 110 metra hædd.

Nýggi vatnbrunnurin rúmar umleið 3.000 tonsum av vatni. Tað er Hans Tausen Olsen í Runavík, ið stendur fyri leveringini av brunninum, sum danskt felag hevur framleitt.

Sjóvar kommuna hevur eisini útvegað sær eitt nútímans reinsiverk, sum skal reinsa áarvatnið, áðrenn tað fer í nýggja brunnin.

### Alt kelduvatn

- Vit hava fleiri størri og smærri vatngoymslur, sum allar hava reint kelduvatn. Nú hesin nýggi brunnurin verður forsýnaður við áarvatni, verður vatnið reinsað, áðrenn tað fer í brunnin.

Tummas Johannesen, tekniskur leiðari í Sjóvar kommunu, sigur, at nýggi brunnurin verður at taka til, soleiðis at hann kemur at forsýna hinar brunnarnar, tá tørvur er á vatni. Hinir brunnarnir liggja allir niðari í haganum.

- Hetta verður einasti brunnur í kommununi við áarvatni, og tí verður vatnið, sum fer í hendan brunnin, reinsað, áðrenn tað verður latið í hinar goymslurnar.

Tekniski leiðarin sigur, at kommunan hevur lagt einar fýra kilometrar av rørum langt niðan í hagan, og íbindingarnar úr nýggja brunninum og oman í verandi goymslur eru framdar fyri nøkrum árum síðan. Tó hevur okkurt verið at gjørt



*- Hetta er ein íløga, sum kemur øllum í Sjóvar kommunu til góðar, sigur Tummas Johannesen, tekniskur leiðari*

aftrat við nýggjum ventilum og slíkum.

### Stór íløga

Nýggi vatnbrunnurin hjá Sjóvar kommunu við reinsiverki, longum leiðingum og íbindingum í hinar goymslurnar er ein stór íløga hjá kommununi.

- Hetta er ein íløga fyri fleiri miljónir krónur, men hetta er samstundis ein íløga, sum øll í kommununi fáa nakað burtur úr, sigur Tummas Johannesen.

Sum skilst, miðjar Sjóvar kommuna eftir, at alt vatnarbeiði verður liðugt í hesum árinum.

# Soknir bátar eru ein trupulleiki

**Ymsastaðni kring landið liggja skip og bátar, sum liggja tungir í sjónum – og onkur klárar ikki at halda seg omaná**

UMHVØRVI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hetta eru gomul fiskifør, sum í flestu førum einki fiskiloyvi hava – ella eru í so ringum standi, at tað loysir seg ikki at umvæla tey.

Ofta verður sagt um hesi, at tey ongan góðan hava, og tað er ivaleyst rætt. Hinvegin munnu flestu ognarlutir hava ein ella annan eigara, so ella so.

Ein lesari á vestaru síðu av Skálafjørðinum hevur sent okkum myndir av báti, sum er sokkin á Hulki á Strondum. Hetta er gamli trolbáturin Hansa Maria, sum hevur ligið norðast við bryggjuna á Hulki í rúma tíð.

Í Sjóvar kommunu sigur Tummas Johannesen, tekniskur leiðari, at kommunan hevur vent sær til eigararnar og hevur biðið teir um at fáa bátin uppaftur.

- Vit hava fingið at vitað, at tað helst fer at ganga ein tíð, áðrenn teir, ið eiga bátin, fáa stundir at gera nakað við hetta, tí teir eru beint í endanum av vertíðini á landleiðini.

Sum skilst, er hetta fyrstu ferð, at hesin trolbáturin hevur ligið við botnin á Hulki.

### Burturbeining

Sosialurin fer ein av komandi døgunum at hyggja uppá, hvussu slíkir bátar og skip kunnu beinast burtur, tí hetta er ein trupulleiki ymsastaðni kring landið. Vit fara eisini at spyrja onkran myndugleika, um loyvt er at søkkja skip og bátar longur, sum gjørt hevur verið – og um so er, hvørji krøv so verða sett til bátin. Hugsandi eru krøv um, at maskina og onnur dálkandi útgerð skal takast upp úr skipinum fyri møguliga søkking.

Í aðrar mátar er spurningurin, hvussu slík burturbeining í veruleikanum fer fram, og hugsandi er, at hon ikki er heilt ókeypis fyri tann, ið eigur farið.



*Sokkin skip og bátar eru ein trupulleiki kring landið. Spurningurin er, hvussu hesi før, sum einki fiskiloyvi hava, skulu beinast burtur*
*Mynd: Bergur Østerø*